GJALDSTOVAN

| | |
|---|---|
| ALMENNIR STOVNAR | Argir: des. 2020<br>FGj. j.nr.:<br>(at tilskila í svari)<br>Tygara j.nr.: |

**Ymisk viðurskifti, nú roknskapurin fyri 2020 skal verða gjørdur liðugur**

Nú farið verður undir at leggja síðstu hond á roknskapin fyri 2020, fer Gjaldstovan at biðja stovnarnar um:

- At kanna, at tíðaravmarkingar av útreiðslum og inntøkum um ársskiftið eru rættar. Sí á gjaldstovan.fo um evnið, og hvussu farið kann verða fram.
- At stemma av kreditorar um ársskiftið. T.e. at samanbera kontuavrit e.tíl. frá kreditorum við tær rokningar, sum eru skrásettar í FSL fyri 2020. Sí á heimasíðuni um evnið, og hvussu farið kann verða fram. Vandin er fyri, at tað eru rokningar, sum ongantíð eru skrásettar!
- Gera upp ferðaforskot og avrokna hesi.
- At gera upp møguligt endurgjald frá Barsilsskipanini.
- At avrokna yvirtíð og ferðaendurgjald fyri 2020.
- At skuld millum almennar stovnar verður avgreidd í roknskaparárinum fyri 2020.
- At sett verður av móti tapi av debitorum og støða verður tikin til, um krøv verða send til sakførara at heinta inn.
- At anlegg eru skrásett

Eru talan um viðurskifti, sum ikki eru skrásett ella eru skeivt skrásett, er gjørligt at skráseta hetta í 13. skeiði fyri 2020, sum verður latið aftur mikudag 24. februar 2021.

Annars verður mint á øll viðurskifti, sum skulu verða staðfest í sambandi við ársenda - sí skjal EK 76, eisini eru upp á pláss.

g.v.

Odd Bjellvåg